# Gaggutir tónleikarar í Nólsoy

**- Vit eru væl upplagdir og hava lagt taktikk alla vikuna, sigur Terji Rasmussen, sum saman við bassleikaranum Arnold Ludvig er venjari hjá eldra fótbóltsliðnum, ið tapti móti yngru tónleikarunum á ovastevnu í fjør. Í ár ætla teir at fáa uppreisn**



*Terji Rasmussen hevur ringt dúgliga seinastu dagarnar fyri at manna eitt lið við eldri tónleikarum. Á liðnum í ár telist millum annað Jóannes Jacobsen, Uni Arge og Eyðun Nolsøe*

OVASTEVNA

*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Aftur í ár verður skipað fyri einum forvitnisligum fótbóltsdysti í Nólsoy á Ovastevnu. Liðini, ið dystast á fótbóltsvøllinum í Nólsoy, eru nevniliga mannað við føroyskum tónleikarum.

Liðini eru býtt soleiðis, at útvaldir tónleikarar yngri enn 30 ár spæla ímóti eldri tónleikarum, ið eru farnir upp um 30-ára-markið.

Í fjør tapti eldra liðið 6-12 móti teimum yngru, og tí ætlar Terji Rasmussen, ið saman við bassleikaranum Arnold Ludvig er venjari hjá teimum eldru, at fáa uppreisn.

- Vit taka hendan dystin í ramasta álvara. Vit eru væl upplagdir og hava lagt taktikk alla vikuna, sigur Terji Rasmussen, ið sjálvur er búsitandi í Nólsoy. Og møguleikarnir at fáa eitt betri úrslit í ár tykjast vera til staðar. Eldra tónleikaraliðið hevur nevniliga megnað at fáa gamla HB-málrevin Una Arge afturat sær. Eisini verður HB-veteranurin Jóannes Jacobsen við. Harumframt kemur tangentleikarin Regin Guttesen – ein gamal bóltsnillingur, sigst– at manna eldra liðið í ár. Eyðun Nolsøe verður eisini við – sum leikari á eldra liðinum, sjálvsagt.

## Flúgvandi útskiftingar

Yngra liðið av tónleikarum skal kortini ikki undirmetast. Leikandi venjari er trummuleikarin úr Deja Vu, Rúni Højgaard. Hann hevur royndir sum AB-málmaður, og sum skilst, stóð hann ein branddyst í fjør og var ein av orsøkunum til, at yngru tónleikararnir vunnu. Ein annar tónleikari, ið spælir við yngra liðnum á lítla fótbóltsvøllinum í Nólsoy leygardagin, er gamli B36-leikarin og nú bassleikarin Mikael Blak, ið sigst vera ein sera dugnaligur miðvallaleikari.

Níggju leikarar verða á hvørjum liði. Dysturin er styttur nakað. Hvør hálvleikur er ein hálvan tíma, og talan verður um flúgvandi útskiftingar. Hetta er kanska ikki so býtt, tí sum skilst, vórðu fleiri fiburskaðar í fjør.

Ætlanin við dystinum er at geva áskoðarum møguleika at síggja føroysku tónleikararnar úr einum øðrum sjónarhorni. Arbeitt verður eisini við at fáa ein frásøgumann at gera viðmerkingar frá síðulinjuni.

Dysturin verður leygardagin kl. 16, og tað er ókeypis atgongd.

MARKNAÐARRÁK

VIKA 32 2007

**PARTABRØV HILDU ÁFRAM AT LÆKKA**

Seinast í farnu viku lækkaðu partabrøvini aftur, tá kredittvirðið á íløgubankanum Bear Sterns varð niðurmett av Standard & Poor. Orsøkin var m.a. nýggj tíðindi um, at tveir hedge-fondar hjá bankanum eru komnir illa fyri vegna teirra stóru eksponering móti Sub-prime lánum. Eisini vánalig arbeiðsmarknaðartøl úr USA fríggjadagin gjørdu sítt til lækkingina.

Hóast t.d. evropisk partabrøv eru lækkað umleið 8% síðan hálvan juli, er hækkandi partabrævarákið síðan 2003 ikki av. Heimsbúskapurin er væl fyri og amerikanski búskapurin fær sannlíkt eina bleyta lending. Møguligt er tó, at partabrøv kunnu lækka nakað aftrat, áðrenn kredittmarknaðurin er komin í javnvág. Hedgefondar í USA kunnu verða noyddir at selja partabrøv fyri at betra um gjaldførið. Fyri íleggjarar kann hetta gerast eitt gott keypshøvi. Serliga áhugaverd eru virkir, sum hava víst góðar roknskapir og sum eru lágt virðismett sum t.d. ABB, Nokia og SKF. Tó eiga íleggjarar at bíða til marknaðirnir eru vorðnir meira støðugir og ein við størri vissu kann siga hvar rákið fer.

**DOLLARIN LÆKKAÐI**

Sum skrivað varð i seinasta marknaðarráki, skuldu góð arbeiðsmarknaðartøl úr USA til, fyri at fáa dollaran at hækka meira. At arbeiðsloysið gjørdist hægri enn væntað og at partabrøv lækkaðu, fekk dollarin at lækka niður í 5,38 frá 5,44 tá hann var hægstur í farnu viku.

**RENTURNAR AFTUR LÆKKAÐAR**

Kredittkreppan hevur merkt lánsbrævarenturnar. Eftir at tær lækkaðu í seinnu hálvu av juli, hava tær seinastu vikuna at kalla staðið í stað. Gongdin næstu dagarnar er tengd at partabrøvunum.

**HESA VIKUNA**

Hesa vikuna fara íleggjarar serliga at hava eyguni við vikuligu arbeiðsloysitølunum úr USA, umframt at lurtað verður eftir hvat amerikanski tjóðbankin fer at siga um rentugongdina. Spenningur er um tjóðbankin kemur við ábendingum um, at man er til reiðar at lækka rentuna, um afturgongdin húsamarknaðurin heldur fram.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1399,24 | -1,57% |
| Alheims partabrøv | 8391,44 | -1,34% |
| Atlantic Petroleum | 1118,00 | + 3,52% |
| Føroya Banki | 249,00 | + 0,4% |
| Eik | 708,00 | -4,19% |
| KB Trygg Eurostoxx | 109,28 | + 0,41% |
| USD | 539,60 | -0,67% |
| JPY | 4,54 | -0,53% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK